

# Statoil góðtekur milliónabót

**Jan Müller**

19.11.2013 - 21:25

Oljan.fo

Norska oljufelagið Statoil hevur gjørt av at góðtaka eina bót uppá 10 mió. kr., sum felagið herfyri varð dømt til at gjalda í eini sak um oljuleka í Norðsjónum.

Eftir nakað av av umhugsanartíð hevur felagið gjørt av at taka undir við bótini, tað varð dømt at gjalda í oktober. Hetta upplýsir Statoil í einum tíðindaskrivi.

Málið gongur aftur til 2009, tá ein leki á oljukelduni Veslefrikk varð uppdagað á havbotninum. Eftir hetta varð felagið meldað av bæði Bellona umhvørvisfelagsskapinum og norska statinum fyri lekar, har eitrandi kemisk evni eru farin út í havið.

“Hetta er ein sera óheppin hending, sum ikki átti at verið farin fram,” sigur Terje Gunnar Hauge, stjóri hjá Statoil, sum eisini vísir á, at Statoil hevur ikki varhugan av, at lekin skal hava ført til veruliga dálking av havumhvørvinum.